Tiltøk á Klaksvíkar bókasavni

Klaksvíkar bókasavn fer aftur at skipa fyri tiltøkum í vetur. Byrjað verður aftur týskvøldið 23. september við einum einum fyrilestri

TILTØK
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Fyrilesturin, sum verður týskvøldið, verður hildin av Doris Hansen. Hann fer at snúgva seg um støðuna hjá teimum brekaðu í dag.

Føroya Landsstýri hevur avgjørt, at 2003 skal verða ár teirra brekaðu. Føroyar eru sostatt eitt av mongum evropeiksum londum, sum hava valt at seta viðurskifti teirra brekaðu á dagsskránna í ár. Hetta skal verða við til at flyta mørk og broyta almenna hugburðin, so framtíðar forðingar fyri tey brekaðu verða eitt sindur lættari at vinna á.

Bókasavnið hevur eisini valt at varpa ljós á " Ár teirra brekaðu" og tískil byrja tiltøkini í ár við einum fyrilestri um støðuna hjá teimum.

Nýtt tiltak

Bókasavnið hevur saman við barnaansingarstovnunum í fleiri ár havt tiltøk fyri børnum undir skúlaaldur, og nú er tíðin komin eisini at gera okkurt fyri børnum, sum ganga í skúla. Tí er ætlanin í vetur at fara undir eitt nýtt tiltak fyri børnini. Annan hvønn hósdag verður upplestur og byrjað verður hósdagin 25. september klokkan 17. Tá verður lisið úr bókini "Emil úr Lønnebergi".

Øll børn eru vælkomin til upplesturin eisini saman við foreldrum.

Ein skrá er gjørd yvir upplestrardagarnar, og hvat lisið verður. Skráin fæst á bókasavninum og sæst á heimasíðuni hjá bókasavninum www.kb.fo.

NÓSI HEVUR FØÐINGARDAG

Til lukku, NÓSI

Nósi heldur føðingardag frá mánadegnum 22. til fríggjadagin 26. september! Hetta tíðarskeið vitjar hann allar Føroya Bankadeildirnar.

Ferðaætlan hjá Nósa kring oyggjarnar

Norðuroyggjar			
Klaksvík	týsdagin	23-09-2003	kl. 10.30-11.00
Klaksvík	týsdagin	23-09-2003	kl. 14.30-15.30
Eysturoy			
Leirvík	mánadagin	22-09-2003	kl. 13.00-14.00
Gøta	mánadagin	22-09-2003	kl. 14.30-15.30
Eiði	mánadagin	22-09-2003	kl. 14.30-15.30
Norðskáli	týsdagin	23-09-2003	kl. 14.30-15.30
Fuglafjørður	mikudagin	24-09-2003	kl. 14.30-15.30
Saltangará	hósdagin	25-09-2003	kl. 10.30-11.00
Toftir	hósdagin	25-09-2003	kl. 14.30-15.30
Saltangará	hósdagin	25-09-2003	kl. 16.30-17.30
Strendur	fríggjadagin	26-09-2003	kl. 13.00-14.00
Skáli	fríggjadagin	26-09-2003	kl. 14.30-15.30
Vágar			
Miðvágur	hósdagin	25-09-2003	kl. 14.30-15.30
Sørvágur	hósdagin	25-09-2003	kl. 16.00-17.00
Sandavágur	fríggjadagin	26-09-2003	kl. 13.30-14.30
Sandoy			
Skopun	fríggjadagin	26-09-2003	kl. 14.00-14.30
Sandur	fríggjadagin	26-09-2003	kl. 15.00-15.30
Suðuroy			
Vágur	mánadagin	22-09-2003	kl. 14.00-15.00
Hvalba	týsdagin	23-09-2003	kl. 13.00-13.30
Tvøroyri	týsdagin	23-09-2003	kl. 14.30-15.30
Streymoy			
Kollafjørður	týsdagin	23-09-2003	kl. 13.00-14.00
Vestmanna	mikudagin	24-09-2003	kl. 14.00-15.00
N. Finsensgøta	hósdagin	25-09-2003	kl. 10.30-11.30
Hornabøur	hósdagin	25-09-2003	kl. 13.00-14.00
SMS	hósdagin	25-09-2003	kl. 14.30-15.30
N. Finsensgøta	hósdagin	25-09-2003	kl. 16.30-17.30

Kom inn á gólvið og hav sparikistilin við, so seta vit peningin inn á tína Nósakonto og tú fært eina flotta mateskju heim við!

www.nosi.fo

FØROYA BANKI

Lasse Klein í trupulleikum

Fyri fáum døgum síðani varð gjørt vart við, at formaðurin í landsfelagi Sjálvstýrisfloksins, Lasse Klein, á duldan hátt hevði umsett grein úr donsku Weekendavísini til egið lesarabrævr, og kann hann nú koma í trupulleikar. Bæði formaðurin í danska blaðmannafelagnum og løgfrøðiligi konsul felagsins meta tað vera brot á lógina um upphavsrættin, og kunnu teir krevja stórt endurgjaldskrav ella fara í rættin, um tíðindamaðurin á Weekendavísini, Hans Mortensen, ynskir hetta

Lasse Klein kann í framtíðini koma í trupulleikar vegna brot á lógina um upphavsrætt. - Lasse Klein skal gjalda við kassa 1, um hann hevur framt lógarbrot, og um tíðindamaðurin á Weekendavísini ynskir hetta, sigur formaðurin á danska blaðmannafelagnum

LÓGARBROT
Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo

Í seinastu viku hevði Lasse Klein lesarabrævr í Dimmalætting og Sosialinum við heitinum "Ein samgonga á vegamóti". Síðani kom í øðrum lesarabrævi frá Sjúrða Skaale fram, at greinin í brotum varð umsett orðarætt úr atfinnandi grein um bretsku Blair-stjórnina í donsku Weekendavísini, uttan at víst varð á nakra keldu. Bert vórðu nøvnini á politiskum flokkum skift út.

Lasse skal gjalda við kassa 1

Formaðurin í landsfelagi Sjálvstýrisfloksins, Lasse Klein, hevur síðani víst á, at hann bert hevur fingið íblástur og ikki umsett nakað, men danska blaðmannafelagið ynskir nú at hyggja nærri at málinum, sum kann fáa avleiðingar fyri sjálvstýrismannin.

- Talan er um brot á lógina um upphavsrætt, og tískil fara vit beinanvegin at hyggja nærri at málinum og upplýsa viðkomandi tíðindamann á Weekendavísini um hetta, og so er tað í seinasta enda hansara avgerð, um vit sum fakfelag skulu fara víðari við málinum, sigur formaðurin í danska blaðmannafelagnum, Mogens Blicher Bjerregaard.

Spurdur, hvørjar ítøkiligar avleiðingar kunnu væntast, sparir formaðurin ikki uppá krútið.

- Uttan sjálvur at hava kannað málið kann eg við støði í upplýsingunum úr Føroyum siga, at Lasse Klein skal gjalda við kassa 1. Endurgjaldskrav verður í fyrsta lagi kravt frá honum, um Hans Mortensen á Weekendavísini ynskir tað, og síðani kann málið fara víðari í rættin, um tað verður neyðugt, vísir ein avgjørdur fakfelagsformaður á.

Fleiri lógarbrot

Løgfrøðiligi konsulin í danska blaðmannafelagnum, Christian Dølpher, vísir somuleiðis á, at Lasse Klein hevur framt lógarbrot á fleiri økjum.

- Fyrst og fremst hevur hann ikki søkt um loyvi at nýta greinina, síðani hevur hann tikið æruna fyri sjálvur at vera høvundur uttan at upplýsa keldur, og í triðja føri hevur hann í veruleikanum broytt eina grein hjá øðrum tíðindamanni við at skifta nøvn á flokkum út. Við hesum hevur hann framt fleiri lógarbrot, sigur løgfrøðingurin.

Víðari vísir hann á somu avleiðingar sum formaðurin, og undirstrikar hann, at farið verður víðari við málinum.

- Tíðindamaðurin á Weekendavísini skal fyrst og fremst upplýsast um málið frá okkum, og síðani er tað í seinasta enda hansara avgerð, um vit sum fakfelag skulu ákæra Lassa Klein. Í fyrstu atløgu fara vit í øllum førum víðari við málinum til Hans Mortensen á Weekendavísini. Um hendingin gerst rættarmál, kemur tað sambært løgfrøðinginum undir heitið "civilt søgsmál".

Stórt endurgjaldskrav

Løgfrøðiligi konsulin Christian Dølpher sigur, at talan kann gerast um stórar peningaupphæddir, hóast hann ikki longu nú kann upplýsa, hvussu stórt endurgjaldskravið verður.

- Við fleiri brotum á lógina um upphavsrætt kann føroyski politikarin koma at gjalda stóra peningaupphædd, men nøgdin á endurgjaldskravinum er eisini tengd at, hvussu tíðarkrevjandi greinin hevur verið fyri Hans Mortensen á Weekendavísini. Løgfrøðingurin á blaðmannafelagnum sigur, at hevur Hans Mortensen nýtt nógva tíð, kann upphæddin gerast enn størri.

Christian Dølpher vísir tó á, hvussu avgerandi tað er, um Lasse Klein hevur beinleiðis umsett ella bert fingið íblástur.

- Tað er jú altíð loyvi at fáa íblástur, og tískil mugu vit nú kanna, í hvussu stóran mun hann hevur nýtt greinina hjá Hans Mortensen.

Weekendavísin seinasta orðið

Sum áður nevnt fer danska blaðmannafelagi í øllum førum at hyggja nærri at málinum og upplýsa Weekendavísina um, hvat Lasse Klein hevur gjørt, og síðani mugu teir bíða eftir aftursvarið frá blaðnum.

- Um blaðmaðurin ella Weekendavísin ynskja at hyggja nærri at málinum og møguliga krevja endurgjald fyri beinleiðis umseting ella kopiering, taka vit ábyrgdina í størsta álvara at verja rættindini hjá okkara limum, men tað er so teirra avgerð, hvat víðari hendir, sigur Christian Dølpher, løgfrøðiligur konsul í danska blaðmannafelagnum.

Viðmerkjast skal, at yvirritaði ikki fekk orðið á Hans Mortensen frá Weekendavísini, sum hevur seinasta orðið.

Soleiðis samanber Sjúrður Skaale í lesarabrævi 15. september greinarnar báðar, og er hetta eitt av fleiri líkandi dømum.

Weekendavísin: "De (t.e. Blair stjórnin, ss) kom ind med en fantastisk entusiasme, og en overvældende styrke. Og de besluttede at fortsætte på samme måde i regering, som de havde gjort i opposition. Med de samme metoder. Derfor lækkede de alting. Parlamentet får ikke længere tingene at vide først. Regeringen lækker til venligtsindede journalister. Det er mangel på respekt for parlamentet. Det skaber foragt for politik, og det skader journalistik i ekstrem grad. Journalister har måttet finde sig i at blive hængt ud, tyranniseret og undergravet i forhold til redaktører. Beskeden er: Hvis du skriver som vi vil have, får du noget. Hvis ikke er din karriere i fare."

Lassi Klein: "Teir yvirtóku landsins stýri við eini ótrúligari idealismu fyri skjótt seks árum síðani, og ruddaðu alt framman fyri sær við einari styrki sum ikki var sædd áður, og teir samtyktu at halda fram í landsstýrinum á sama hátt sum teir høvdu gjørt í andstøðu. Við somu atferð. Hetta er orsøkin til, at teir leka øll tíðindi. Løgtingið fær ikki longur boðskapin um málsviðgerðirnar fyrst. Landsstýrismenn leka til góðu vinir sínar í fjølmiðlaheiminum. Eingin virðing er fyri løgtinginum longur. Hesin arbeiðsháttur skapar vanvirðing fyri politiska arbeiðinum, og skaðar arbeiðið hjá journalistum í stóran mun. Fjølmiðlafólk hava verið noydd at funnið seg í at verða hongd út, kúgað og trælkað. Boðini eru greið: skrivar tú sum vit vilja hava, so fært tú nakað. Um ikki, so er tín karriera í vanda."

Lasse Klein vísir skuldsetingum aftur

Í aftursvari sínum til skuldsetingarnar um lógarbrot og møguligu avleiðingarnar sigur Lasse Klein, at alt ov nógv er gjørt av, og at hann ikki óttast stórvegis avleiðingar. – Vit fáa øll íblástur okkara ymsastaðni frá, sigur formaðurin í landsfelagi sjálvstýrisfloksins

LÓGARBROT
Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo

Lasse Klein kennir seg ikki hóttan, hóast hann sambært berandi kreftum í danska blaðmannafelagnum hevur framt brot á lógina um upphavsrætt.

- Eg kann ikki hugsa mær, at teir fara víðari við málinum. Teir skuldu heldur fegnast um, at greinir teirra verða nýttar, sigur Lasse Klein. Hann vísir á, at hóast greinin í Weekendavísini um bretsku Blair-stjórnina varð nýtt sum útgangsstøði í lesarabrævi hansara um Tjóðveldis- og Fólkaflokkin, varð talan um egin sjónarmið, sum hóska til føroysk viðurskifti.

- Tveir dagar eftir, at eg fekk áheitan frá Fregnum at skriva til blaðið, læs eg úr Weekendavísini, og tá gjørdi eg av at nýta greinina um bretsk viðurskifti til mína egnu skriving í Fregnum, og fólk eru samd við mær í, at somu hugsanir eru galdandi fyri føroysku samgonguna, sigur Lasse Klein.

Ásannar eisini mistak

Tó sigur sjálvstýrismaðurin úr Eysturoynni, at hann skuldi havt upplýst um kelduna.

- Eg havi viðgingið, at eg skuldi gjørt greitt, hvaðani íblástur mín kom, og tað er so eitt mistak, eg ásanni, og so er málið út av verðini, sigur Lasse Klein, sum als ikki metir talan vera um nakað lógarbrot.

- Vit fáa øll íblástur okkara ymsastaðni frá, og um hetta skal dragast fram, skulu rættiliga nógv onnur mál eisini fram í ljósið, vísir hann á. Lasse spyr, hvussu ein t.d. kann skriva nakað um Magnus Heinason, um hann ikki hevur fingið upplýst um søguligu mannin í søgubókum okkara, og á henda hátt nýta vit øll keldur ymsastaðni frá til egið brúk.

- Stórir søguligir menn høvdu vent sær í grøvini, um teir ikki vórðu endurgivnir av ættarliðunum eftir teir, vísir Lasse Klein á.

Yvirdrivið

Lasse Klein harmast um, at gerð hansara á henda hátt verður gjørd til nógv meiri, enn hon í veruleikanum er.

- Eg havi bert lýst føroysku politisku viðurskiftini við støði í útlendskari grein, sum hóskaði sera væl til, og tískil er hetta yvirdrivið, har alt ov harðliga er farið til verka.

Hóast hann ásannar, at hann skuldi upplýst um kelduna úr Weekendavísini, metir hann seg als ikki hava framt revsivert brot á lógina um upphavsrættin, og hevur hann ongar viðmerkingar til skuldsetingarnar frá danska blaðmannafelagnum.